Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur
løgtingskvinna

Løgtingið

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ferðslu
(Broyta áseting um rúsevnakoyring og ásetan av møguleika at avgreiða mál við fráboðan)

§ 1

Í løgtingslóg um ferðslu sbrt. løgtingslógarkunngerð nr. 14 frá 2. mars 1988, sum seinast broytt við § 30 í løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022, verða gjørdar hesar broytingar:

1. § 15, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Motordrivið akfar má ikki verða ført ella roynt at verða ført, av nøkrum, hvørs blóð, meðan hann koyrir ella aftaná, hevur í sær:
1) evni, ið ávirka tilvitið, sum sambært reglum, ásettum av landsstýrismanninum, eru flokkað sum vandamikil fyri ferðslutrygdina
2) Cannabis (tetrahydrocannabinol – THC), har nøgdin í blóðinum er oman fyri 0,001 mg. pr. kg. blóð, ella
3) evni, sum eru fevnd av nr. 1 og 2, sum viðkomandi hevur tikið sambært eini lógligari ávísing, um hetta ikki er gjørt í samsvari við ávísingina."

2. Í § 16, stk. 3 verður aftaná "Ásetingarnar í stk. 1 og 2" sett: "og § 15"

3. Í § 16, stk. 4 og stk. 5 verður "§ 15, stk. 2" broytt til: "§ 15"

4. Í § 16 a, stk. 1 verður aftaná "brot á" sett: "§ 15 og"

5. Í § 58, stk. 2, nr. 1 verður tvær staðni aftaná "útandingarluftini" sett: "og um nøgdin av cannabis (THC) í blóðinum, meðan koyrt verður ella aftaná, hevur verið oman fyri 0,009 mg THC pr. kg. blóð"

6. § 58, stk. 6 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 6.* Sektir sambært stk. 1 verða ásettar við atliti at inntøkuviðurskiftunum hjá viðkomandi, tá brotið verður framt. Tá støddin á sektini fyri rúsdrekkakoyring og brot § 15, stk. 1, nr. 2 verður ásett, skal fyrilit eisini verða tikið fyri alkoholstyrkini í blóðinum ella í útandingarluftini ella nøgdini av cannabis (THC) í blóðinum, meðan koyrt verður ella aftaná."

7. § 58 g, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Um mál um rúsdrekkakoyring ella brot á § 15 ikki verður mett at bera við sær hægri revsing enn sekt, ella tað fyriliggur eitt mál við spurningi um frádøming av koyrirættinum sambært §

59 a, stk. 1, nr. 1, 2, 3, 4, 5, 6 ella 8, stk. 2, nr. 1, 2, 3, 4, 5, 1. pkt. og 8, stk. 4, stk. 5 ella § 59 i, stk. 1, nr. 1, 2, 3, 4 ella 5 ella stk. 3, nr. 1, 2 ella 4 kann ákæruvaldið, í staðin fyri at lata inn ákærurit til rættin, gera hin skuldsetta kunnigan við, at málið kann verða avgreitt uttan rættarsókn, um skuldsetti viðgongur seg sekan í brotinum og váttar seg fúsan til innan eina ásetta freist, ið eftir áheitan kann verða longd, at gjalda eina í fráboðanini ásetta sekt, og harumframt tekur við koyriforboði ella við treytaðari ella treytaleysari frádøming av koyrirættinum í eitt tíðarskeið, sum er ásett í fráboðanini."

8. Í § 59 verður aftaná "luft" sett: "og gjørt seg sekan í broti á § 15, stk. 1, nr. 2, har nøgdin av cannabis (THC) í blóðinum er hægri enn 0,001 mg. THC pr. kg. blóð"

9. § 59 a, stk. 1, nr. 6 verður orðað soleiðis:
"6) hann hevur framt brot á § 15, stk. 1, nr. 1 og 3, ella framt brot á § 15, stk. 2, sum ikki er fevnt av § 59 a, stk. 2, nr. 5."

10. § 59 a, stk. 2, nr. 5 verður orðað soleiðis:
"5) hevur framt brot á § 15, stk. 1, nr. 1 og 3, ella undir herðandi umstøðum hevur framt brot á § 15, stk. 2"

11. § 59 b, stk. 2 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 2*. Treytaleys frádøming fyri rúsdrekkakoyring við eini alkoholstyrki upp á oman fyri 1,20 promillu í blóðinum, ella 0,60 mg pr. litur luft í útandingarluft og koyring ávirkað av cannabis (THC), um nøgdin av cannabis (THC) í blóðinum er oman fyri 0,003 mg. THC pr. kg. blóð ella fyri brot á § 15, stk. 2, ið er fevnt av § 59 a, stk. 2, nr. 5 og er dømt at geva treytaleysa frádøming, verður gjørd fyri eitt tíðarskeið, sum í minsta lagi er 3 ár."

12. Í § 59 i, stk. 1, nr. 3 verður aftaná "luft" sett: "og koyring ávirkaður av cannabis (THC), um nøgdin av cannabis (THC) í blóðinum er oman fyri 0,003 mg. THC pr. kg. blóð."

13. Í § 59 i, stk. 1, nr. 4 verður "§ 15, stk. 1 2. pkt" broytt til: "§ 15, stk. 1, nr. 1 og 3"

14. Í § 59 i, stk. 3, nr. 1 verður aftaná "luft" sett: "og koyring ávirkaður av cannabis (THC), um nøgdin av cannabis (THC) í blóðinum er oman fyri 0,003 mg. THC pr. kg. blóð."

15. Í § 59 i, stk. 3, nr. 2 verður "§ 15, stk. 1 2. pkt." broytt til: "§ 15, stk. 1, nr. 1 og 3"

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Almennar viðmerkingar

Galdandi lóggáva tekur ikki nóg stóra hædd fyri, hvussu vandamikil tey, sum hava inntikið hash ella THC (tetrahydrocannabinol – THC) eru fyri ferðsluna. THC hevur ta ávirkanina á fólk, at tað minkar um uppmerksemið og reaktiónsevnini, og sostatt økist vandin fyri ferðsluvanlukkum enn meira.

Strangari revsing fer at verja samfelagið - bæði bilførarar og fótgangarar fyri møguligum skaðum og í ringasta føri deyða í ferðsluni. Eisini hevur ein herðing av lógini eina møguliga ræðandi ávirkan, sum minkar um hugin/avgerðina hjá einum borgara at koyra ávirkaður av THC. Hetta kann bjarga lívum og forða fyri óhappum.

Tískil er tað av alstórum týdningi, at revsingin fyri tann koyrandi, sum hevur hash í blóðinum hægri enn 0,001 mg. THC pr. kg. blóð, verður herd. Harafturat er eisini neyðugt at broyta ásetingarnar um, nær mál kunnu avgreiðast við fráboðan, soleiðis at játtanarmál ikki skulu ikki leggjast fyri Føroya Rætt.

Í stóru myndini er ein lógarbroyting um herda revsing eitt greitt siginal um, at tað als ikki er góðtikið at koyra ávirkaður av hashi, og at hetta tí verður strangt handhevjað.

1.1.Galdandi lóggáva

Galdandi lóggáva er løgtingslóg um ferðslu sbrt. løgtingslógarkunngerð nr. 14 frá 2. mars 1988 um ferðslu, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022. Í stuttum loyvir galdandi lóggáva ikki dusandi (euforiserandi) evnum í blóðinum, sum merkir, at tú ikki kanst koyra bil, um blóðið hjá tær inniheldur rúsevni, sum eru flokkað sum vandamikil fyri ferðslutrygdina. Revsingin er tongd at, hvussu ofta tú hevur gjørt misbrotið, og hvussu nógv tú hevur tikið.

1. ferð verður koyrikortið tikið treytaleyst í 3 ár, umframt at bót verður givin alt eftir, um læknakanning vísir, at tú hevur tikið í minna ella meira lagi.

2. ferð er treytaleysa frádømingin 5 ár.

3. ferð verður koyrikortið tikið treytaleyst í 10 ár.

Tað er innihaldið av virknum evnum í blóðinum, THC, sum verður mált, tá ávísast skal, um ein bilførari er farin um hámarkið í mun til hash/kannabis. THC kann ávísast í nógvar tímar ella dagar, eftir at tú hevur tikið tað – hvussu nógv valdast um, hvussu tú hevur tikið tað og nøgdina.

Óvirkna niðurbrótingarevnið av kannabis eitur THC-sýra. THC-sýra kann verða ávíst í eini landroynd heilt upp í fleiri vikur eftir, at tú tókst kannabis. Mátingin av THC-sýru í landinum verður tó ikki brúkt sum prógv at vísa á, at farið er um hámarkið.

1.2. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við uppskotinum er at stuðla uppundir og tryggja høvuðsendamálið við ferðslulógini, sum er:

§ 1. *Stk. 2. Endamálið við ferðslulógini er, at eingin skal doyggja ella fáa álvarsligt mein av ferðsluvanlukku í vegaflutningsskipanini*

1.4. Samandráttur av nýskipanini

Revsingin fyri at føra akfar, tá nøgdin av cannabis (THC) í blóðinum er hægri enn 0,001 mg. THC pr. kg. blóð – teirri mongd av hashi, sum samsvarar við tað støði fyri promillukoyring, ein hevur, tá ein liggur millum 0,2 og 0,5 promillu - skal revast harðari, enn um ein er ávirkaður eins nógv av rúsdrekka. Tað vil siga, at broytingar í ásetingini um koyra ávirkaður av evnum, sum ávirka tilvitið, sum t.d. hashkoyring, skal fáa serstaka áseting.

Revsingin av hashkoyring skal taka útgangsstøði í somu reglum, sum vit kenna frá rúsdrekkakoyring. Revsingin skal tí frameftir hækka alt eftir, hvussu stór mongdin av hash er í blóðinum, eins og vit kenna tað frá mátingum av promillustiganum viðvíkjandi rúsdrekka.

Mælt verður til í hesum lógaruppskoti, at revsing fyri hashkoyring verður framd eftir einum leisti, har revsingin fyri koyring við hashi (tetrahydrocannabinol – THC) í blóðinum hækkar alt eftir, hvussu nógv innihald av THC er mátað í blóðinum.

Fyri at lætta um málsviðgerðina er eisini neyðugt at broyta ásetingarnar um, nær mál kunnu avgreiðast við fráboðan, so játtanarmál ikki skulu leggjast fyri Føroya Rætt.

Galdandi ásetingar um koyring við evnum í blóðinum, sum ávirka tilvitið, eru, at tann sum koyrir ávirkaður, (minstamarkið), verður revsaður við einari sekt, sum svarar til hálva nettománaðarløn og treytaleysa frádøming av førararættinum í 6 mánaðir, óansæð hvussu stór nøgdin av rúsevnum í blóðinum er.

Avleiðingarnar av uppskotinum

Ein møgulig avleiðing kann vera, at fleiri pengar koma inn í landskassan, av tí at revsingin verður herd.

Serligar viðmerkingar

Til § 1
Til nr. 1
§ 15 um, at ongin má føra ella royna at føra motordrivið akfar um viðkomandi er ávirkaður av tilvitsávirkandi evnum o.ø. verður broytt soleiðis, at ásetingin ítøkiliga nevnir mongdina av cannabis (tetrahydrocannabinol – THC) í blóðinum.

Til nr. 2 og 3
Endamálið við broytingini er at víðka um bannið fyri at føra motordrivið akfar í § 15 til eisini at fevna um bann fyri at koyra ella royna at koyra ella stýra ella royna at stýra prutli, súkklu, hestavogni ella hesti ella ríða á hestbaki, um viðkomandi er ávirkaður av cannabis, soleiðis sum hetta er ásett í § 16.

Til nr. 4
Ásetingin um at krevja útandingarroynd verður víðkað til eisini at fevna um brot á § 15 um rúsevnir.

Til nr. 5

Revsingin fyri rúsevnakoyring verður herd um so er, at nøgdin av cannabis í blóðinum, meðan koyrt verður ella aftaná, hevur verið omanfyri 0,009 mg THC pr. kg. blóð.

Til nr. 6
Ásetingin verður víðkað til eisini at fevna um rúsevnakoyring við tað, at tá støddin á sektini verður ásett, skal fyrilit eisini verða tikið fyri nøgdini av cannabis í blóðinum.

Til nr. 7
Ásetingin í § 58 g um at mál, sum ikki bera við sær hægri revsing enn sekt, ella tað fyriliggur eitt mál við spurningi um frádøming av koyrirættinum sambært ávísum ásetingum í lógini, kann avgreiðast uttan rættarsókn, um skuldsetti lýkur ávísar treytir, verður víðkað til eisini at fevna um brot á § 15 um rúsevnir.

Til nr. 8
Ásetingin verður broytt, so hon eisini fevnir um rúsevnakoyring.

Til nr. 9 og 10
Frádøming av rættinum at koyra motordrivið akfar sambært § 59 verður broytt til at fevna um nýggju orðingina av § 15.

Til nr. 11
Ásetingin verður broytt, so hon eisini gevur heimild til treytaleysa frádøming fyri koyring, ávirkað av cannabis, um nøgdin av cannabis er sum ásett í ásetingini.

Til nr. 12
Treytað frádøming av rættinum til at koyra lítið prutl verður broytt til eisini at fevna um koyring, ávirkað av cannabis.

Til nr. 13
Treytað frádøming av rættinum til at koyra lítið prutl verður broytt til at fevna um nýggju orðingina av § 15, stk. 1, tó undantikið koyring ávirkað av cannabis, ið er regulerað í nýggju orðingini í § 59 i, stk. 1, nr. 3.

Til nr. 14
Treytaleys frádøming av rættinum at føra lítið prutl fyri eitt tíðarskeið uppá millum 6 mánaðir og 10 ár verður broytt til eisini at fevna um koyring ávirkað av cannabis.

Til nr. 15
Treytaleys frádøming av rættinum at føra lítið prutl fyri eitt tíðarskeið uppá millum 6 mánaðir og 10 ár verður broytt til at fevna um nýggju orðingina av § 15, stk. 1, tó undantikið koyring ávirkað av cannabis, ið er regulerað í nýggju orðingini í § 59 i, stk. 3, nr. 1.

Til § 2
Gildiskoma.

Á Løgtingi, 7. mars 2024

Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur